SAMBAND
JAN MÜLLER
JAN@SOSIALURIN.FO
TLF 341800



# Føroyska líkasælan sæst aftur í gjaldsmynstrinum




**Føroyska líkasælan, ella ópræsisheitin, sæst aftur í gjaldsmynstrinum, heldur stjórin í fyrstu inkasso fyritøkuni í Føroyum. Vantandi virðingin fyri fakturum ger, at vit ikki yvirhalda gjaldstíðir, og sambært Jákup Bech Jensen, so er hetta fyribrigdi meiri útbreitt í Føroyum enn aðrastaðni.**

## FAKTA

- Intrum Justitia-samtakið varð stovnað í 1923 í Svøríki
- Er í sag størsta innheintingarfyritøkan í Evropa
- Er í millum størsta innheintingarfyritøkur í heiminum
- Umleið 3000 fólk starvast hjá Intrum-samtakinum
- Intrum Føroyar varð stovnað í 2006 og har starvast í dag fimm fólk

**Men tað fer hansara fyritøka nú at broyta**

INKASSO
*Orð & myndir:*
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Størsta inkasso fyritøkan í øllum Evropa hevur nú fingið sítt sæti í Føroyum. Jákup Bech Jensen eitur stjórin, og hann hevur fýra fólk aftrat sær í gomlu hølunum hjá Kunningarstovuni í gongugøtuni í Havn.

Intrum Føroyar er fyrsta inkasso fyritøkan í Føroyum, men sambært stjóranum er tað neyðugt við eini slíkari.

– Føroyska líkasælan, ella ópræsisheitin, sæst aftur í gjaldsmynstrinum. Í Føroyum eru vit von við altíð at møta eitt korter ov seint , og hetta er fyri so vítt eisini galdandi í gjaldsmynstrinum. Vantandi virðingin fyri fakturum ger, at vit ikki yvirhalda gjaldstíðir, sigur Jákup Bech Jensen.

– Í Spania siga tey ofta "í morgin", men eru upp aftur verri og siga "kanska í morgin", og tað sigur ikki lítið um hugburðin, heldur Intrum stjórin.

**Hjálpa fyritøkum at fáa pengar inn**

Høvuðsvirksemið hjá Intrum verður at hjálpa fyritøkum at fáa pengar inn.

– Tað eru fleiri fyritøkur, ið hava trupult við at fáa pengar inn. Tak til dømis timburmannin, sum er øgiliga dugnaligur til sítt handverk, men ikki dugir so væl at skriva rokningar og krevja pening inn fyri sínar uppgávur. Er hesin timburmaðurin kundi hjá okkum, so hjálpa vit honum við at fáa pengarnar inn, og hann fær nýtt meiri tíð til tað, hann dugir so væl.

– Tað eru eisini tey, sum ikki hava trupulleikar við at fáa pengar inn, men heldur stríðast við at fáa pengarnar inn til tíðina. Hesum fáa vit eisini hjálpt, soleiðis at tey fáa pengarnar inn til tíðina, sigur Jákup Bech Jensen.

Við øðrum orðum er tað fyrst og fremst inkassovirksemi, sum Intrum Føroyar fer at taka sær av. Harnæst eisini kemur fyritøkan at veita aðrar tænastur sum skuldareftirlit, millumlandainnheinting og endurrindan av mvg.

**Ikki gera ikki nakað**

Jákup Bech Jensen leggur tó eina við, at øll kunnu koma í skuld.

– Tað er onki ónatúrligt í tí, men tá er tað øgiliga umráðandi, at fólk ikki gera ikki nakað, smílist hann tá hann trívur í slagorðið hjá fyritøkuni.

Slagorðið hava tey hoyrt nógv fyri. Ikki gera ikki nakað! Øll hava eina meining um tað, men eitt er so sikkurt og vist, og tað er at tað hevur fangað. Øll kenna lítla gula bilin við slagorðinum á, og nú eru vindeyguni í hølunum har kunningarstovan fyrr helt til, prýdd við hesum sama gula liti og eyðkenda slagorði.

Inni í hølunum starvast í dag fimm fólk, men í næstum fer Intrum Føroyar at víðka um virksemi sítt, soleiðis at tvey fólk koma aftrat fyritøkuni. Hetta tí, at Intrum Føroyar er í støðugum vøkstri og hevur fyritøkan í dag omanfyri hundrað kundar, og tað eru alt frá bóndum, bakara, bilasølu, møblahandlum, hotel, og hondverkarum.